*Í kjalavørrinum á bankakreppu og dómarakanning:*

# Bretskir fjølmiðlar seta kikara á FØ-DK

*Stóra bankamálið og álitiskreppan, sum hevur tikið seg upp millum Føroyar og Danmark, fær nú eisini rúmd í útlendskum bløðum. Í Bretlandi eru fleiri av teimum stóru bløðunum farin at vísa málinum ans.*

Tað er eitt tað størsta og mest virda blaðið í Bretlandi, "Financial Times", sum nú er farið at skriva um Føroyar og um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Nú um dagarnar var grein um marknatrætuna millum Føroyar/ Danmark og Bretland.

Hetta er eitt mál, sum sjálvsagt hevur stóran áhuga í Bretlandi, nú nógv olja funnin júst við tað umstríddla markið millum londini.

Men bankamálið og álitiskreppan millum Danmark og Føroyar hevur eisini stóran áhuga hjá blaðnum og hevur blaðkvinnan Hilary Barnes skrivað fleiri greinar um málið. Hon er korrespondentur hjá blaðnum í danska høvuðsstaðnum.

Í grein í Finacial times týsdagin undir yvirskriftini "Faroe-Danish relation rocked by bank row" verður greitt frá, at bankakreppan hevur kostað føroysku stjórnini næstan tvær milliardir kr.

Blaðið greiðir annars frá gongdini í málinum, har danska stjórnin hevur víst aftur einum føroyskum ynski um at seta í verk eina dómarakanning av, hvussu Den Danske Bank kundi sleppa burtur úr eigaraskyldum sínum í Føroya Banka.

Blaðið greiðir rættiliga gjølla frá bankamálinum og vísir á, at tað hevur skatt viðurskiftini millum londini.

Blaðið nemur eisini við spurningin um eina komandi oljuvinnu við Føroyar og skrivar, at møguleikin at finna olju á føroyska landgrunninum hevur eisini reist spurningin um, hvussu stóran part um nakran Danmark skal hava av hesum.

"Verður olja funnin, so kann hon gera Føroyar búskaparliga sjálvstøðugar, men føroyingar hava brúk fyri danskari hjálp í samráðingunum við Bretland um markið".

jan


Faroe-Danish relations rocked by bank row

# Danska stjórnin hevur mistikið seg

*– Hon átti at viðgingið, at tað var skeivt at nokta føroyingum eina dómarakanning, sigur Lise Lyck við tíðindastovuna Ritzau í gjár*

Lise Lyck, búskaparserfrøðingur, sammetir viðgerðina av ungsamtyktini í donsku stjórnini sum "bananstatsmetoder". Hon sigur, at Poul Nyrup Rasmussen misbrúkar brævið hjá Niels Pontoppidan, hægstarættar forseta.

Hetta brævið hevur als einki við føroyska málið at gera. Dómararnir hava ikki nokta at gera brúk av heimildini til dómarakanning. Teir hava bert ávarað ímóti at misnýta skipanina, sigur Lise Lyck.

Búskaparserfrøðingurin sigur annars, at longu Poul Schlüther, sum tá var forsetismálaráðharri, á heystið 1992 gjørdi ein grovan feil, tá hann læt Landsstýrinum upp í hendi at taka ábyrgd fyri bankabjargingini.

Hann fekk føroyingar at skriva undir eitt mál, sum í veruleikanum hoyrdi undir donsk viðurskifti, heldur Lise Lyck.

Heimastýrislógin sigur greitt, at valutaunniónin er galdandi millum londini, men at Danmark hevur peningapolitisku ábyrgdina.

Tað, at ein banki fer á húsgang er avgjørt týðandi pengapolitiskt mál, sum Danmark eigur at taka sær av.

Við bankamálinum í Føroyum er prógvað, at danir settu lógina til víks og tóku politiska støðu. Tað er sera óheppið fyri eitt demokratiskt land, sigur Lise Lyck.

Tað átti heldur ikki at verða nakað til hindurs fyri nýtt dómarakanningina í hesum føri. Umframt tað at tveir so sterkir partar sum danski staturin og Den Danske Bank, verður tað eisini ómetaliga trupult at finna óheftir persónar, sum kunnu standa fyri kanningini. Tað verður sambært LisuLyck eisini ógjørligt at fáa tey neyðugu skjølini útvegað.

Eisini er hetta eitt stýrisskipanarligur trupulleiki og avgjørt eisini ein spurningur um trúvirði. Tað er ikki neyðugt at gera eina skjóta kanning, men heldur um at hon verður trúverdug.

Allar umstøður í málinum vísa á, at tað er best at gera eina dómarakanning. Tá hetta politiskt afturvíst, so er farið út um politiskt dømandi valdið. Hetta er vanliga ikki slíkt, sum ikki hoyrir einum demokratiskum landi til. Tað er bert í bananstatum, at slíkt verður gjørt, sigur Lise Lyck.

– Um vit góðtaka vanliga demokratiska skipan, sum er millum lógevandi - dømandi og útinnandi valdið, noyðist ein sum dani at verða ógvuliga ivingarsamur um støðuna, sigur Lise Lyck.

Dagny

Hetta vikuskiftið bjóða vit hesa matarskrá:



Fiska-súpan við Fiskapettum
–
Búffur Forrestiere við Heiðasoppum
–
Sukurlátukøka við Jarðberum

3 rættir fyri: 189,00 kr.

Vinarliga bíleggið borð

Nólsoyarstova
Matstova
í Gongini 10 - Tlf 11800 - Fax 1 9905

Lýsið í sosialinum

HF Hotel Föroyar
Tlf. 17500
Hotellið við útsýninum

STÓR FISKABUFFET & DANSUR verður á HOTEL FØROYUM
fríggjakv. 3. febr. & leygarkv. 4. febr.

»Jens Lisberg & Vinmenn« spæla til dansin bæði kvøldini.

Fyri kvøldið KR. 200,-

Bussur koyrir oman í býin eftir dansin

30 ymiskir kaldir og heitir rættir.



Gestakokkarnir Peter Turtschaninoff, stjóri í Norðurlandahúsinum, og Birgir Enni, matgera flogvu rættirnar á opnu grillini í matstovuni.

Altíð vælkomin á Hotel Föroyar
Vinarliga bíleggið borð
Tlf. 17500